## Nei til samkynd hjúnarløg



Hægstirættur í Kalifornia hevur víst aftur einari kæru frá teimum samkyndu í statinum, sum eru misnøgd við, at ein fólkaatkvøða í november í fjør bannaði samkyndum at giftast. Rætturin sigur í sínum úrskurði, at hann kann ikki ganga ímóti fólksins vilja og vísir á, at meirilutin av teimum, sum vóru á fólkaatkvøðu, vóru ímóti samkyndum hjúnarlagi. Fyri einum ári síðani staðfesti hægstirættur annars, at samkynd kundu giftast, og tað eydnaðist 18.000 samkyndum hjúnum at fáa pappírini avgreidd, áðrenn fólkaatkvøðan bannaði fleiri samkyndum hjúnarløgum.

# Lata Selatrað upp fyri familjuni Føroyum

**Á Selatrað leggja tey nú síðstu hond á største og flottasta bálpláss í landinum og tað verður tikið í brúk fyrstu vikuna í juli við stórari almennari familjulegu, har tað ber til hjá øllum at liva sum skóti í eina heila viku**

SKÓTALÍV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Her fæst ein hóming av, hvussu nýggja, stóra bálplássið í skótadeplinum á Selatrað, sær út. Tað er bygt sum ein hálvrundingur við fyrimynd í leikpallunum í gamla Róm og tað verður tikið í nýtslu við stórari familjulegu fyrst í juli, har øll eru vælkomin, eisini tey, sum ikki eru skótar*

Fyrstu vikuna í juli verður høvi hjá øllum familjum í landinum at royna seg sum skóti í eina viku.

Tað verður, tá ið KFUM-skótarnir bjóða øllum føroyskum familjum á almenna legu í skótadeplinum á Selatrað

Tað gera tey í sambandi við, at tey nú leggja síðstu hond á arbeiðið at gera tað stóra bálplássið, sum verður miðdepilin í skótadeplinum.

Tað er ikki hissini bálpláss, talan er um, tí tað hevur kostað 700.000 krónur at gera og tað verður pláss fyri einum 1000 fólkum til prát, sang og hugna rundan um bálið.

Men Magni Laksáfoss, skótaovasti, sigur, at tá ið skótarnir gera so nógv burtur úr einum bálplássi, er tað júst tí, at tað er bálið og hugnin rundan um tað, sum er miðdepilin í skótalívinum.

Og hetta bálplássið er eisini nakað heilt serligt, tí tað er bygt sum ein hálvrundingur við fyrimynd í uttandura leikpallunum í gamla Róm.

Skótaovastin sigur, at endamálið er eisini, at tað skal bera til hjá uttanveltaðum at leiga skótadepilin og bálplássið til uttandura sjónleik, fólkafund, ella onnur tiltøk.

### Skótalív í eina viku

Bálplássið er bara fyrsta byggistig í arbeiðnum at nýtímansgera allan skótadepilin og tá ið hetta er liðugt, verður arbeitt víðari og hvørt, sum ráðini vera til tað.

Magni Laksáfoss sigur, at nú bálplássið er liðugt, verður tað tikið alment í nýtslu og tað verður tað við eini stórari familjulegu, sum verður fyrstu vikuna í juni.

Tað verður ein almenn familjulega, fyri familjur við børnum í øllum aldri, har øll eru vælkomin, eisini tey, sum ikki eru skótar.

Á leguni sleppa øll at búgva í tjaldi og at royna skótalívið í eina viku og tað verður rættiliga nógv uttandura ítriv á skránni, bæði jarnsmíð, útróður, ferðabreyt, postarenning, síging drekabygging, matgerð á báli og mangt annað.

Av tí, at talan er um skótalív, er familjulegan sjálvandi rúsfrí.

Tey, sum ikki hava umstøður at hava tjald við sær, kunnu leiga sær kamar á skótadeplinum, men tað ber eisini til at koma á legu í kampingvogni.

Men tað er eisini køkur í skótahúsinum, sum tey, sum ikki gera mat sjálvi, kunnu keypa sær døgverða og annan mat.

Og miðdepilin í øllum hesum uttanduralívinum verður so tað stóra legubálið, sum er mitt í skótadeplinum og tá verður bálplássið eisini tikið alment í brúk.

# Leitar eftir málningum í Føroyum

**Danskur listamálari er í hesum døgum í Føroyum og leitar eftir málningum eftir danska málaran, Niels Bjerre**

Tað er listamálarin Jørgen Rud, sum eisini er útbúgvin í listsøgu, sum í hesum døgum er í Føroyum og leitar eftir málningum eftir kenda, danska listamálaran, Niels Bjerre.

Tá ið Jørgen Rud las listsøgu á universitetinum, skrivaði hann sergrein um Niels Bjerre og í hesum sambandi hevur hann stóran áhuga í at vita, hvar allir málningarnir, sum liggja eftir hann, eru.

Tí er hann áhugaður í at sleppa at skráseta so nógvar málningar eftir Niels Bjerre, sum gjørligt.

Og tá ið Jørgen Rud er komin til Føroya í hesum sambandi er tað ikki av tilvild, tí Niels Bjerre var í Føroyum í tveimum skiftum í 1925 og 1926.

Í Føroyum málaði hann eisini fleiri málningar og hann hevði listaframsýning her á landi, sum avbera nógv fólk vitjaðu eftir tátíðar metum.

Hann undirskrivaði ofta sínar málningar við forbókstavunum NB.

Tí ivast Jørgen Rud ikki í, at onkrir málningar eftir Niels Bjerre eru í Føroyum og teir vil hann fegin hava høvi at skráseta.

Tá ið Niels Bjerre var í Føroyum, var hann serliga á Eiði, men hann hevur eisini málað í Kvívík og við Gjógv.

Tey, sum hava málningar eftir Niels Bjerre, fáa fatur á Jørgen Rud á telefon nummari 26 68 52.



*Hendan myndin av Kvívík er rættiliga eyðkend fyri listina hjá Niels Bjerre*